# At taka grind upp

**Nógvir mans á hvørjum hvali. Onkunstaðni er ein kvinna at síggja eisini. Summir við endanum hægst. Annar við eini spikfjós í hondini og ein triði, sum ikki sleppur framat at skera, stendur og fylgir við og gevur góð ráð til tann, sum knívinum heldur**

GRIND
*Edvard Joensen*

Mannamúgvan veksur alsamt á havnarlagnum. Klokkan er júst farin av sjey, og Útvarpið hevur sagt frá, at nú fara seðlarnir at koma út hvørja løtu. Eingin vil liggja eftir, tí tann, sum ikki møtir, kann rokna við, at hansara partur bara verður býttur upp í hjá hinum, og so er hesin fongurin fokin.

Her hittist fólk úr ymsum heraðshornum. Menn sum kennast væl eru í fylgi, aðrir, sum ikki hava hitst í áravís, heilsast og tosa um hetta og hitt.

Menn eru spentir. Hvussu man fara at hilnast? Frætt er, at fongurin er rímiliga stórur, og eitt skinn man fara at vera í drápspart. Men verða heimapatar eisini býttir? Og hvussu stórir verða teir?



*Bíðað hevur verið við longsli eftir hesi løtuni. Og hvør biti verður tikin upp*

*Mynd: Edvard Joensen*

Løgið, sum hetta at vilja fáa, og helst fáa nógv, knappliga sprettur upp í fólki. Og er nakað, sum kann fáa havisjúku fram í føroyinginum, so er tað hetta at fáa grind.

So er hann har. Sýslumaðurin. Kemur saman við einum timum, fýra politistum í politibilinum. Teir hava sitið alla nátt og arbeitt við at fáa hetta roknistykkið at ganga upp. Nógvar partar skal hetta í. Bara drápspartarnir liggja um teir 1.300. So koma allir hinir. Finningarbátur, vakt, upptøka merking, grindaformenn, almennir stovnar og hvat nú kann vera, sum fær part.

Vit hava á veg út higar í morgun longu møtt fyrstu lastbilunum við grind. Hesir, sum hava fingið part, áðrenn seðlarnir eru komnir út, eru bilar frá ymsu kommununum, sum hava fingið fráboðan um heimapartar. Og skilabest hevur sýslumaðurin so hildið verið at fáa hetta av vegnum, meðan nátt enn var, og feðslan ikki var rættiliga byrjað.

Tí hann veit sum er, at tá tað fer at nærkast tíðini, seðlarnir væntast at koma út, verður eit kaos av eini aðrari verð á smølu kommunuvegunum. Her tykist ikki nokk við eini motorsúkklupatrulju at halda skil á. Men lukka í teir báðar, sum her eru, so knáir teir eru kortini. Og fólk er í góðum lag, hóast tey halda seg hava ringa tíð, so lurtað verður eftir teimum og gjørt, sum teir siga.

So kemur sýslumaðurin út av havnarskirvstovuni við seðlunum í hondini. Ein hjálpamaður við einum rópara eru í høllinum, og menn byrja at troðka seg nærri trappuni fyri at vera sum næst, tá lisið nú verður upp.

Hann byrjar við at siga frá søguni hjá grindini, eftir at hon varð funnin., hvussu rikið varð, hvussu drápið gekk. Og at enda, hvussu býtt er. Fólk bíða tolin eftir tí, øll vilja vita. Hvør verður mín partur?

Jú, finningarbáturin er fyrstur. Hann fær ein seðil fyri seg, við nummari á hvalinum. So koma grindaformenninir. Ein fyri og annar eftir. Teir, sum hava tikið upp á bryggjuna og lagt út til merking, fáa sínar seðlar. Merkjarar fáa sítt. Ellisheimið eigur eisini part, áðrenn farið veður til drápspartarnar.

So er at lurta væl og vita, hvørjum hvali tú ert á. Og so hvørt, sum nøvnini verða nevnd, kemur lív í rúgvuna. Teir, sum til hoyra, fara at leita eftir hesum góða hvali fyri at vera á staðnum, tá býtt verður. Tann, sum næstur er trappuni, fer upp eftir seðlinum, og sum ein annar professionellur ferðaleiðari fer hann við seðlinum á lofti gjøgnum rúgvuna, og teir, sum til hoyra, halda spentir aftaná.

So verður leitað, til hvalurin er funnin, og við tað sama leggja teir bragdligastu á at skera. Horn og bøksl verða skorin av, og so verður rist aftur eftir rygginum og undir búkinum. Ein fer at skera tvørturum. Eitt sindur ósamdir eru teir um, hvussu breitt hann skal skera, men tað endar vanliga við eini rímiliga breiðari ál, sum viðhvørt, um hvalurin er stórur, er so passaliga mannbar, tá skorið er.

So verður tað lagt á bryggjuna við hvøljuni niður, og tvøstið, so hvørt skorið er, lagt omaná.

Teir skera tvøstið ymiskt. Onkur, sum royndur er, hugsar um lykkjurnar. Sker langar og trivaliga lutir. Men aðrir, sum ikki hugsað soleiðis, skera bara har, teir sleppa framat. Úrslitið hjá teimum verður heldur misjavnt, og hinir gomlu hava hug at hava at og vísa teimum, hvussu teir skulu gera.

Jú, hann er skorin liðugur øðrumegin, og so er at venda. Men her er torngt, so hann má flytast eitt sindur fyrst, fyri at fáa lagt hann aftur soleiðis, at menn fáa staðið báðumegin og skorið.

Tað gongur á sama hátt sum í áðni.

So verður býtt. Spikstykkini verða flutt, og tvørtið kastað omanyvir. Summir meta og viga í hondini, meðan aðrir ikki eru so vandaligir. Hyggja at tvøstlutunum og tveita so yvir í rúgvuna. Tann, sum ikki etur seg mettan, sleikir seg heldur ikki mettan, halda teir, og so er býtt.

Onkur heldur seg vera óhepnan í teirri løtuni, hann tekur upp. Men tað er skjótt gloymt.

Stóra takið er so at sleppa burtur við fonginum. Og tað er ein søga fyri seg í hesum meldrinum. Menn ganga við trillubørum. Summir berandi baljur ella lakaíløt. Onkur við einum viðfestivogni sleipandi. Og so er onkur sannilia so optimistiskur, at hann heldur, at komandi er inn í rokan við bili.

Og nú er tað rættiliga, at løgreglumenninir skulu vísa, hvør dugur er í teimum. Jú, tað gongur upp á stás, hóast onkur heldur teir hava í so góða tíð.

Helst man tað vera onkur, sum ikki heldur, at tað er vert at brúka meira tíð upp á grind. Nú er at sleppa aftur til arbeiðis. Tí hóast tað smakkar væl og er forkunnugt hjá nógvum, má sannast, at kilogprísurin er rímiliga høgur, tá alt verður tikið við.



*Tá ár eru millum grindirnar, eru hesir bitarnir teir, mest verður longst eftir*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Øgilig ferðsla í Vágum

**Ferðslan gjøgnum Vágatunnilin var dupult so nógv í samband við grindina, ið doyði í Bø týskvøldið, sum hon var, tá mest varð koyrt í fjør**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Tað koyrdu reiðiliga 3.500 bilar gjøgnum Vágatunnilin teir báðar dagarnar, grindin var hildin til og tikin upp í Vágum fyrr í vikuni. Hetta er dupult so nógv, sum tá ferðslan var mest í fjør, siga tey á skrivstovuni hjá Vágatunlinum.

Tann dagin, grindin varð hildin til, fóru knappliga 1.600 bilar gjøgnum tunnilin, og dagin eftir var talið nærri 2.000.

Hóast hetta sigur løgreglan í Vágum, at ferðslan í oynni gekk av tí besta hesar dagarnar, og einki óhapp er fráboðað.

Tey fingu hjálp úr Havn at halda skil á, verður sagt av politistøðini í Miðvági.

Tá hildið varð til í Bø týskvøldið, vórðu allir bilarnir, sum har komu, parkeraði í øðrum vegkantinum. Tað gjørdi, at røðin var øgilig, og teir seinastu grindamennirni, sum møttu upp, sluppu at ganga nakrar kilometrar, sigur løgreglan.

Hetta er mesta tal av fólki, sum verið hevur í grind í Vágum nakrantíð, og grundin er einføld. Hetta var fyrsta grind, sum hildin varð til í Vágum, síðan Vágatunnilin lat upp.

Kortini siga tey á politistøðini í Vágum, at tey í grundini høvdu væntað fleiri fólk hesar dagarnar.



# Klaksvík fær heimasíðu í summar

**Flestu fyritøkur, stovnar og virki hava í dag eina heimasíðu, har tú kanst finna upplýsingar av ymsum slagi. Klaksvíkar kommuna hevur ikki havt eina heimasíðu í yvir tvey ár, men hon verður klár, áðrenn summarið er av, sigur John Færø, býráðsskrivari**

HEIMASÍÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Ein skuldi trúð, at nærum allar fyritøkur, stovnar og virki hava heimasíður. Ja, enntá privatpersónar hava eina. Men tá ein skrivar www.klaksvik.fo kemur bara ein fyribils síða fram, har tað stendur, at nýggj heimasíða er í gerð.

Og soleiðis hevur tað sæð út í meira enn tvey ár. Kritikkurin millum fólk hevur verið nógvur, og tey eru mong, sum halda tað er stór skomm, at næststørsta kommunan í landinum ikki hevur eina heimasíðu.

Hesum tekur John Færø, býráðsskrivari undir við.

– Tað er ein grúulig skomm, men nú verður arbeitt miðvíst við henni, og vænta vit, at hon verður klár í leypi av summarinum, sigur hann.




*Soleiðis hevur heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu sæð í meira enn tvey ár*

## Raðfesting

John Færø sigur, at hann dugir ikki at siga, hví tað hevur drigið so langt út við at fáa eina heimasíðu til Klaksvíkar kommunu, men hann viðgongur tó, at tað kann vera ein spurningur um raðfesting.

– Øll hava so nógv at gera, og tískil hevur tað gingið sera striltið við at fáa hana upp á beinini, sigur hann.

Seinastu tíðina hevur ein bólkur tó arbeitt við heimasíðuni og við at útvega tilfar til hana. Tað er við at koma undir land, og nú er ein persónur settur at leggja alt tilfarið inn á hana.

Forritið til síðuna er keypt, og tilfarið er har, so nú skuldi tað bert verið ein spurningur um tíð, inntil ein heimasíða verður tøk.

## Boðskipan

Umframt upplýsingar um allar stovnarnar og so framvegis, er eisini ætlanin hjá kommuni, at heimasíðan skal virka sum ein boðskipan. Til dømis nevnir John, at býráðsskráin verður løgd út á hana, so at tað verður lættari hjá teimum, ið hava áhuga fyri henni, at síggja hana.

Eisini verða onnur tíðindi ella boð løgd út á heimasíðuna.

Fyri nøkrum árum síðani hevði Klaksvíkar kommuna eina heimasíðu, men hon var als ikki nøktandi, sambært býráðsskrivaranum, og tí varð hon tikin burtur aftur.

– Har var bert ein heilsa frá borgarstjóranum og onkrir upplýsingar, men hon var ikki serliga víttfevnandi, greiðir John frá.

Men so er spurningurin, hvat er verri. At hava eina heimasíðu, sum ikki er so víttfevnandi ella slettis onga.

– Eg kann bara siga, at tað hevur gingið striltið, men nú kemur hon skjótt. Og tá skal hon eisini røktast, tí eitt er at tveita eina heimasíðu út, og eitt annað er at halda hana við líka, sigur John Færø, býráðsskrivari í Klaksvíkar kommunu.

# Løgtingsins umboðsmaður viðgjørt 13 mál

Ársfrágreiðingin hjá løgtingsins umboðsmanni er komin, og í henni ber til at lesa um tey 13 málini, ið vórðu viðgjørd í fjør. Millum tey viðgjørdu málini eru eitt nú málsviðgerðin hjá Fiskimálaráðnum, noktan av navnauppkalling og ikki minst setan av landfornfrøðingi. Hetta seinast nevnda málið er uttan iva tað rúgvumiklasta, og nærum helmingurin av teimum knappliga 350 síðunum í ársfrágreiðingini snúgva seg um júst hetta mál.

Frágreiðingin hjá løgtingsins umboðsmanni verður latin løgtingsmonnum, landsstýrinum, øðrum almennum myndugleikum og fjølmiðlum. Ársfrágreiðingin, ið er umleið 350 blaðsíður, verður eisini at fáa til keyps í bókabúðunum kring landið og kostar 100 krónur. Eisini ber til at lesa frágreiðingina á heimasíðuni hjá løgtingsins umboðsmanni www.lum.fo

**tn**

Vil du være
Dekoratør
eller
Blomsterdekoratør?
- så start din uddannelse i Svendborg
Yderligere information og tilmelding til Dekoratørskolen
på Svendborg Erhvervsskole
Benny Ejdesgaard
telefon 212 001
SVENDBORG ERHVERVSSKOLE
Skovsbovej 43, 5700 Svendborg
www.svend-es.dk
ErhvervsUddannelserne

Leiðari til fíggjardeildina

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til høvuðsdeildina hjá Føroya Shell í Tórshavn.

Tá verandi fíggjarleiðari eftir gott 17 ár í starvinum eftir egnum ynski hevur valt at taka við øðrum uppgávum í fyritøkuni, hava vit brúk fyri einum nýggjum leiðara til fíggjardeildina.

Starvið:
Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv í einum spennandi umhvørvi. Leiðarin hevur alla ábyrdina av fíggjardeildini herundir
· ger av ávegis- og ársroknskapi
· rapportering til útlendska móðurfelagið
· fíggjarætlanum o.t.
· dagligari leiðslu og skipan av deildini
· roknskaparlig umsiting og samskifti við avgreiðslurnar og egnar støðir kring landið.

Leiðarin er partur av leiðslubólkinum við beinleiðis tilvísing til stjóran.

Førleikakrøv:
Til starvið krevst holl ástøðilig útbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving. Dentur verður lagdur á leiðaraevnir og royndir, umframt at tú ert arbeiðssamur og dugir væl at samskifta. Góður kunnleiki í enskum er neyðugur.

Vit bjóða:
Eitt fjølbroytt, spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning, men samstundis eitt krevjandi starv. Vit hava góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Góð løn í samsvar við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan er knýtt at starvinum.

Umsóknir:
Skrivligar umsóknir skulu verða innlatnar í seinasta lagi mánadagin 21. juni og skulu sendast til P/F Rasmussen & Weihe, statsautoriserað grannskoðarafelag, á Glaðsheyggi, FO-100 Tórshavn, telefon nr 351700, har nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Olsen ella Klaus Rasmussen. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.shell.fo